Statoilstjóri í London:

# Framtíð fyri føroyskum gassi í

**Statoil fer í næsta ár at bora ikki færri enn 4 brunnar á Atlantsmótinum, báðumegin føroysk-bretska markið. Stórar vónir eru til hesar brunnar. Verða gassfund gjørd við Føroyar eru sera góðir møguleikar at fáa lønandi framleiðslu burturúr, tí eitt undirstøðukervið er í eygsjón og tí bretski marknaðurin fer at hugra eftir meira gassi í framtíðini. Hetta eru nakrar av niðurstøðunum, sum vórðu lagdar fram fyri toppinum á føroyskum vinnulívi á høvuðsstøðini hjá Statoil í London herfyri**



*Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen varð væl kunnaður um møguleikarnar at selja framtíðar føroyskt gass til bretska marknaðin. Her er hann saman við Rúna M. Hansen, føroyska Statoilstjóranum og Erik Kjos-Hansen, stjóra hjá Statoil í Bretland, har tað arbeiða nærum 200 fólk*

OLJA OG GASS

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

**London:** Framstandandi umboð fyri føroyskt vinnulív og politiskan myndugleikan við sjálvum fíggjarmálaráðharranum á odda høvdu undir vitjanini í London í farnu viku eisini høvi at leggja leiðina framvið høvuðsskrivstovuni hjá norska oljurisanum Statoil, har Rúni M. Hansen, stjóri fyri leitingini við Føroyar og so norski stjórin fyri alt virksemi hjá felagnum í Bretlandi, Erik Kjos-Hansen tóku ímóti. Har var so eisini Gareth Allinson, sum er leitistjóri fyri Bretland og Irland og sum hevur verið við í leitivirkseminum á føroyska landgrunninum. Tey umleið 20 føroysku umboðini frá pengingastovnum og vinnufyritøkum eitt nú báðum føroysku oljufeløgunum fingu eina gjølliga frágreiðing serstakliga um bretska gassmarknaðin við serligum atliti til møgleikarnar fyri framtíðar føroyskari gassframleiðslu.

Erik Kjos–Hansen er ikki ein og hvør í oljuhøpi. Hann er millum royndastu og mest trúgvu Statoilfólkini og hevur júst í ár 25 ára jubileum í fyritøkuni. Mestu tíðina hevur hann arbeitt við gassi. Tað var tí eisini náttúrligt fyri hann at greiða føroyingunum frá, hvat gass veruliga er fyri nakað og hvussu tað verður troytt og brúkt.

Hóast norsku oljuævintýrið fyri tað mest hevur snúð seg um olju og ikki gass, so er nógv broytt seinastu árini. Frá tí at Statoil fyri fyrstu ferð fór at framleiða gass í 1977 hevur felagið økt framleiðsluna so mikið nógv, at heili 14 lond í dag keypa norskt gass. Her eru Frakland og Týskaland størstu móttakarar, men nú er Bretland eisini vorðið ein stórur avtakari av norskum gassi, og eftirspurningurin bara veksur. Ein veruleiki, sum skjótt eisini kann fáa týdning fyri eina møguliga komandi føroyska kolvetnisvinnu.



*Á kunningarfundinum á Statoilhøvuðsstøðini vóru eisini oddafólk í føroyskum vinnulív. Her nýbakaði Føroya Bankastjórin, Janus Petersen á síni fyrstu arbeiðsferð í útlandinum eftir útnevningina saman við Poul Mohr, nevndarlimi í Atlants Kolvetni og Kjartan Hoydal, nevndarformanni*

## Føroyar á gasskortið

Norra útflytur fyri einar 100 mia. kr. í gassi um árið. Enn er bert ein lítil partur av gassinum, sum goymir seg í Norðsjónum fingin á marknaðin. Kanska liggja tey 90% eftir í undirgrundini. – Vit vóna sjálvandi, at Føroyar eisini koma á gasskortið sigur norski Statoilstjórin. Hagtøl fyri framtíðina vísa, at serstakliga bretski marknaðurin fer at hava stóran tørv á gassi. Framleiðslan hjá bretum sjálvum er í minking, og nú teir fara til at brúka gass ístaðin fyri kol í orkusektorinum, verður stórur tørvur á at innflyta gass. Sum støðan er í dag so hevur Bretland stórt undirskot á gassi. Eisini onnur lond liggja framvið at flyta gass til Bretlands, ja heilt úr Algeria og Quatar, men tað er langur teinur at flyta gassið.

- Eg síggi tí fyri mær, at verður gass funnið við Føroyar, so skuldi tað havt góðan møguleika at verið kappingarført á bretska marknaðinum sigur Erik Kjos-Hansen, sum heldur tað vera góðar møguleikar fyri at leggja gassleiðing úr føroyskum øki og knýta í gassleiðingar, sum longu eru og sum fara at koma á breskum øki á Atlantsmótinum. Her veldst tað um kostnaðin. Her er longu ein slík leiðing frá BP kelduni Schiehallion til Sullom Voe í Hetlandi. Og nú tosar oljufelagið Total um at leggja enn eina leiðing. Alt hetta kann vera ein byrjan til eina heilt nýggja gassprovins á Atlantsmótinum greiddi norski Statoilstjórin føroysku umboðunum frá undir vitjanini á Statoilhøvuðsstøðini í London.

Tað at franska oljufelagið Total av álvara er farið undir at útbyggja fyrsta gassfeltið vestan fyri Hetland, Laggan, kann fáa kollveltandi týdning fyri alt økið. Tað kann so merkja, at her kemur eitt veruligt undirstøðukervi - infrastruktur at virka og tað kann bráddliga fáa lív í øll tey